# Kenn kirkju tína
# 2021-2024

**Tilgongd:** Frá tí at kirkjan varð yvirtikin, hevur biskupur ynskt at styrkt innaru virði Fólkakirkjunnar. Nakað er gjørt, men vit verða ongantíð liðug. Vakstarliðið, sum eg setti niður av prestum í 2019, at gera átøk Fólkakirkjunni at frama, hevur arbeitt við eini verkætlan, sum ber heitið "Kenn kirkju tína". Prestar úr øllum landinum hava fylgt gongdini, og alt hevur verið gjørt í samráði við biskup.

Sambært Løgtingslóg um kirkjuráð §6, stk. 1 og Løgtingslóg um embæti í fólkakirkjuni §30, stk. 2, skal hvør kirkjuráðslimur og hvør kirkjutænari vátta "við trú og heiður at vilja inna tað starv, sum litið verður honum til, í trúskapi móti lærugrundarlagnum hjá evangelisk-luthersku fólkakirkjuni, soleiðis at hon kann bjóða kirkjuliðnum góð kor fyri lívi og vøkstri."

Vit, sum tæna í Fólkakirkjuni, eiga at kenna tað, vit skulu vera trúgv wmóti. Og skulu vit arbeiða fyri nøkrum, mugu vit vita hvørjum. Evangelisk-lutherska læran gevur okkum bæði trygt grundarlag at standa á, eina missión at arbeiða eftir, og eina visjón at stevna ímóti.

**Ætlanin:** At skipa fyri leygardagsskeiði eina ferð hvørt hálvár 6 ferðir. Seinasta skeiðið er sett til tveir dagar, har møguleiki er at liggja nátt. Hugskotið er at møtast 6 ferðir við hvør sínum høvuðsevni býtt á 4 fyrilestrar. Fyrsta høvuðsevnið er "Grundarlagið". Dagarnir verða vanliga skipaðir soleiðis:

Kl. 12.30: Koma og løtt máltíð
Kl. 13.15: 1. tími
Kl. 14.15: 2. tími
Kl. 15.15: Drekka
Kl. 16.00: 3. Tími
Kl. 17.00: 4. tími
Kl. 18.30: Døgurði og endi

Ætlanin er, at luttakarin fær diplom.

**Málbólkurin:** Kirkjuráðslimir og kirkjutænarar í Føroysku Fólkakirkjuni.
**Fokusøkið:** Evangelisk-lutherska læran og Fólkakirkjan.
**Undirvísarar:** Prestar í starvi.
**Endamálið:** At geva kunnleika og at førleikamenna tey, sum standa fyri í Fólkakirkjuni, og sum har gera tænastu.
**Innbjóðari og fígging:** Stiftið bjóðar og fíggjar skeiðini.
**Tilfar:** Ynskiligt er, at fyrilestrarnir verða tykni upp á video og prentaðir, og at bókligt tilfar verður lagið luttakarunum, sum Forlagið Vøkstur gevur út.
**Leiðslubólkur:** Jógvan Fríðriksson, Uni Næs og Bergur D. Joensen.

Vegna Fólkakirkjuna og leiðslubólkin,

Jógvan Fríðriksson, biskupur

# Skrá:

Niðanfyri er skráin við 6 leygardøgum við hvør sínum høvuðsevni, undirevnum og undirvísarum. Tvey leygardagsskeið eru sett av til várið 2022, og til seinast eru tveir dagar, har møguleiki er at liggja nátt, og diplom verður handað.

**Fyrsti dagur: 28. august 2021. Stað: Gøtu kirkja: GRUNDARLAGIÐ**

***Rættvísgering og halgan:*** Ovi Brim
***Bíblian:*** Heri J. Joensen
***Faðirvár:*** Theodor Eli Dam Olsen
***Kristin spiritualitetur:*** Meinhard Bjartalíð

**Annar dagur: 7. mai 2022. Uppskot: KFUM&K í Klaksvík: TRÚGVIN**

***Avnoktanin:*** Patrick Conway de Neergaard
***Kirkjan og sáturin:*** Marjun Lómaklett
***Diakoni:*** Sverri Steinhólm
***Gud Faðir*:** Øssur Kjølbro

**Triði dagur: 27. august 2022. Uppskot: Fríðrikskirkjan: LÍVIÐ**

***Orðið:*** Hanus Pál Jógvanssson
***1.-3. boð:*** Inga Poulsen Dam
***4.-5. boð:*** Bergtórur Hjelm Bjarkhamar
***Gud Sonur:*** Jóannes Purkhús

**Fjórði dagur: 6. mai 2023. Uppskot: Sørvágs skúli: SAKRAMENTINI**

***Altarborðið:*** Jónsvein Bech
***Dópurin:*** Anne Mette Greve Klemensen
***Játtanarritini:*** Jonhard Jógvansson
***Skriftamálið:*** Hanus á Gørðum

**Fimti dagur: 26. august 2023. Uppskot: Holmahúsið á Eiði: KIRKJAN**

***Gudstænastan:*** Marjun í Kálvalíð
***6.-10. boð:*** Jákup Erlingsson Petersen
***Gud Heilagur Andi:*** Maria Jørðdal Niclasen
***Trúboðan:*** Havstein Klein

**Sætti dagur: 4. mai 2024. Uppskot: Hotel Føroyar: TÆNASTAN**

***Ævinleikin:*** Símun Persson Jacobsen
***Vónin:*** Ann Hermansdóttir
***Náðigávur, evni og royndir:*** Derhard Jógvansson
***Lív og vøkstur:*** Gerhard Jónsson Mikkelsen + **Diplomhandan**

**Sjeyndi dagur: 5. mai 2024:**

***Tænastur:*** Uni Næs
***Andaliga leiðsla:*** Jógvan Fríðriksson